**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Endurlýsing

**Skúlastjórastarv í Felagsskúlanum á Oyrarbakka**

Starvið sum skúlastjóri í Felagsskúlanum á Oyrarbakka verður lýst leyst til setanar frá 1. apríl 2005.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Víst verður annars til nærri lýsing av starvinum á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum www.mmr.fo

Umsóknirnar skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **hósdagin 17. mars 2005.** Umsóknarblað liggur á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

Tórshavn, 1. mars 2005
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279 · 110 Tórshavn
Telefon 355050 · Fax 355055
e-postur: mmr@mmr.fo

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Skrivstovufólk til Vágs kommunu

Søkt verður eftir Skrivstovufólki til Vágs Kommunu at byrja 2. mai 2005.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving innan skrivstovuyrki.
Royndir innan skrivstovuyrki.

**Setanartreytir:**
Talan er um fulltíðarstarv.
Starvið er lønt í lønarflokki 2, stig 1, samsvarandi sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petry Joensen tlf. 373024

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal verða Vágs Kommunu í hendi í seinasta lagi 29. mars 2005 kl. 12.00.

Umsóknin skal sendast til :

**Vágs kommunu**
FO-900 Vágur
Viðm. Skrivstovufólk

# Starvsstovuhjálparfólk til Havlívfrøðiligu royndarstøðina

Eitt starv sum starvsstovuhjálparfólk er leyst at søkja á Havlívfrøðiligu royndarstøðini í Kaldbak.

Á Havlívfrøðiligu royndarstøðini verður arbeitt við botndjórum í havinum, og til hetta arbeiði hava vit brúk fyri einum hjálparfólki til at taka botnsýni, fyrireika sýni til víðari viðgerð og røkt av hesum.

Sýnistøkan er sum oftast við báti. Fyrireiking av sýnum fevnir um sálding, fiksering í formalini, skoling og konservering við spritti. Víðari viðgerð fevnir um skiljing av sýnum undir sjóneyku, turking og brenning av sýnum og sálding av turrsýnum. Til arbeiði hoyrir eisini at røkja sýnissavnið, sum bæði er røkt við teldu og á goymslu.

Ein stórur partur av arbeiðinum hevur við sær at arbeitt verður við formalin- og sprittviðgjørdum sýnum.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving t.d. BS í lívfrøði ella starvsstovuútbúgving Tað er eitt krav at hava góðan kunnleika til teldunýtslu yvirhøvur, og serliga forritini Word, Excel og Access, og tað er ein stórur fyrimunur at hava góðan kunnleika til ryggleys dýr í sjónum.

Starvið er roknað sum 60% av fulltíðarstarvi, og lønin verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt, og umsóknir skulu sendast til Havlívfrøðiligu royndarstøðina, Mjólkargøta 3, 180 Kaldbak, og vera okkum í hendi ikki seinni enn 28. mars. 2005. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jan Sørensen, leiðara (Jan@havbotnur.fo).

*Kaldbak 8. mars. 2005*
**Havlívfrøðiliga royndarstøðin**
**Tlf 356111**

# Reyði Krossur Føroya

Aðalfundurin sunnudagin 13. mars 2005 kl. 15.00 í húsinum, Vágsbotnur.

Nýggir limur kunnu tekna set á fundinum, ella senda inn hendan lepan:

Ynski um at tekna meg sum lim:
Navn: ________________
Bústaður: ________________
________________
Tlf. ________________

Limagjald kr. 150 kr. húskið
400 kr. feløg/stovnar

**Reyði Krossur Føroya**
Boks 1015 • FO-100 Tórshavn

**Heimarøktin og Serforsorgin**

# Deildin fyri sinnisveik

Avloysarastørv til sambýlið **Fobbaklettur**

Av tí at tvey av okkara starvfólkum fara í barnsburðarfarloyvið, søkja vit eftir avloysarum:

1 starv á fulla tíð frá 1. mai til 30. novembur 2005.
1 starv á fulla tíð frá 1. juni til 31. desembur 2005.

**Vit søkja eisini eftir fólki at avloysa í summarfrítíðini.**

Vit eru eitt sambýlið við 5 sinnisveikum búfólkum, vit arbeiða við miljøterapi og kontaktpersónskipan
Vit kunnu bjóða eitt fjøltáttað og mennandi arbeiði, við nógvum avbjóðingum, har fleiri av aktivitetunum eru út av húsinum.
Við í tí dagliga arbeiðinum er eisini upplæring og frálæra.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi útbúgving
Psykiatriskar royndir
ella aðrar viðkomandi arbeiðsroyndir
Hava áræði og hegni at arbeiða sjálvstøðugt

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Psykiatrifelag, Føroya Pedagogfelag, Heilsuhjálparfelag Føroya.

Tann, ið settur verður skal kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til leiðaran Signu Andreasen tlf. 227268.

**Umsóknarfreistin er: 23. mars 2005.**

Hevur hettar tín áhuga, og tú heldur tú ert rætti persónur, so vinarliga send eina umsókn við avriti av prógvi og øðrum upplýsingum til:

**Sambýlið Fobbaklettur**
Att: Signa Andreasen
undir Fobbakletti 14
360 Sandavágur

